ítróttur

Nr. 172 • fríggjadagur • 10. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Larsen var nøgdur

**Hóast hann sjálvandi iðraði seg um, at tað ikki eydnaðist okkum at skora, so duldi Henrik Larsen ikki fyri, at hann var veruliga errin av sínum monnum**

VENJARIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eins og hini 6.000 fólkini á Tórsvølli, so var Henrik Larsen sjálvandi errin av sínum leikarum eftir avrikið mikukvøldið.

Í øllum førum var talan um eitt heilt øðrvísi avrik enn tað í Sveis, men sjálvur vildi Henrik Larsen tó ikki heilt viðganga, at talan var um ávíst samanfall millum avrikini í Litava/Týsklandi fyri tveimum árum síðani, og so í Sveis/Tórsvølli hesaferð.

– Um tú vilt, so kanst tú sjálvandi samanbera, men sjálvur haldi eg framvegis, at hitastigini áttu størsta munin. Og tað sást eisini aftur á leikarunum, tí vit orkaðu tað betri í dag.

– Og so haldi eg eisini, at vit fingu stongt holið á miðvøllinum, sum var í Sveis, og tað hevði stóran týdning fyri dystin.

## Ikki um miðjuna

Fyrstu løtuna tóktist eisini, sum vóru fraklendingarnir skelkaðir um føroysku mótstøðuna. Og landsliðsvenjarin var á ongan hátt ósamdur í hesum.

– Eg haldi, at vit hava fult tamarhald á hesa løtuna. Teir vóru nærum ikki framman fyri miðstrikuna. Og sjálvur haldi eg, at hetta er tað besta, sum liðið hevur spælt, ta tíðina sum eg havi verið venjari. Og hugsar tú um, at hetta er bara fýra dagar eftir, at vit hava tapt 6-0, so er tað heilt forbannað flott av leikarunum, staðfesti venjarin.

Og hesaferð skapa vit eisini møguleikarnar til málini?

– Ja. Vit hava einar tríggjar 100% møguleikar, men skora ikki. Teir hava kanska fýra slíkar og skora tvær ferðir. Tað er kanska munurin at vera millum heimsins bestu og ikki.

Og hetta avrikið ger ivaleyst, at tað er lættari at arbeiða fram móti næsta dystinum?

– Sjálvandi, men vit skulu samstundis minnast til, at eru vit ikki á toppinum, so kunnu vit saktans fáa onkran avsmurning afturat. Í dag var avrikið bara framúr, og sjálvur helt eg, at hatta næsta málið var off-side, men har eru so komnar nýggjar reglur, skilji eg á lagnum, kom tað hálvgum smílandi frá Stóra.

– Men annars haldi eg, at vit stríðast ófatuliga væl, og tað hava allir leikararnir uppiborið rós fyri, staðfesti føroyski landsliðsvenjarin.



*– Vit hava svomið og vit hava bowlað, og so hava vit eisini vant eitt sindur, segði venjarin um fyrireikingarnar seinastu fýra dagarnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Svumu og bowlaðu

Tað var ikki frítt, at smílið hjá Larsen var stórt, tá tíðindafundunrin varð hildin. Ikki minst, tá hann var spurdur um, hvat hann hevði gjørt, til tess at betra um lagið í hópinum eftir avsmurningin í Basel.

– Vit hava svomið og vit hava bowlað, og so hava vit eisini vant eitt sindur. Samstundis hava vit so tosað nógv um tað, sum gekk galið í Sveis, og hvørji mistøk vit skuldu rætta. At tað so eydnaðist somikið væl, eri eg bara fegin um, tí hvør tann einasti leikarin á liðnum gjørdi eitt veldugt arbeiði, og tað kunnu vit bara vera nøgd um, segði hann.

# Eg var bangin

**Franski landsliðsvenjarin, Raymond Domenech, viðgekk eftir dystin mikukvøldið, at hann í løtum var bangin um úrslitið.**

FØROYAR-FRAKLAND
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var ein lættur Raymond Domenech, ið hitti bæði fronsku og føroysku tíðindafólkini eftir dystin á Tórsvølli mikukvøldið. Franski landsliðsvenjarin segði, at hann til tíðir hevði kent seg hart kroystan, tí at fraklendingar ongantíð av álvara megnaðu at seta seg á dystin.

## Føroyingar væl skipaðir

Spurdur um dysturin gjørdist truplari enn hann hevði væntað, svaraði Raymond Domenech, at tað helt hann ikki. - Fleiri mettu, at eftir 0-6 ósigurin hjá føroyingum í Sveiss í vikuskiftinum, fóru vit at vinna stórsigur her, men eg var greiður yvir, at so fór ikki at verða. Tað eru nógv dømir um, at føroyska landsliðið hevur spælt upp til stórar tjóðir so sum Týskland, Skotland og onnur, segði franski landsliðsvenjarin.

Raymond Domenech helt, at føroyingar vóru sera væl skipaðir í verjupart-inum serliga, og tað førdi við sær, at tað alt ov ofta gjørdist alt ov trupult hjá hansara monnum at fáa lagt seinastu og avgerandi avleveringina. - Uttan at taka nakað frá føroyingum, so kann eisini sigast, at tað er í slíkum dystum, at álopsparturin hjá okkum veruliga sleppur at royna seg. Eg haldi tó ikki, at okkara álop var nóg sannførandi í dag, segði franski landsliðsvenjarin.

## Noyddust at umskipa

Tá ið tosið kom inn á útvísingina hjá franska lið-skiparanum, Patrik Vieira, var Raymond Domenech fámæltur. - Eg havi ikki hug til at gera viðmerkingar til avgerðirnar hjá dómaranum, men tað er einki dulsmál, at tað er ein smeitur fyri okkum, at Vieira nú er leikbannaður til trupla heimadystin móti írum í komandi mánaða, segði franski landsliðsvenjarin.

Tá ið franski liðskiparin varð rikin av vølli, valdi Domenech eisini at umskipa franska liðið. - Eg valdi at seta Vikash Dhorasoo inn fyri Thierry Henry, so at vit vóru fullmannaðir á miðvøllinum heldur enn í álopinum, har Liverpool-framherjin Djibril Cisse tuskaði einsamallur, segði Raymond Domenech eftir dystin.

Spurdur um tað ikki eigur at verða størri munur á franska liðnum, sum liggur nummar tvey á FIFA-styrkislistanum, og so føroyingar ið eru nummar 137, svaraði Raymond Domenech: - Tað eru ellivu móti ellivu, og føroyingarnir stríddust væl, meðan okkara kundu havt sýnt størri stríðsvilja. Mótstøðan var hørð, og eg haldi, at fleiri veikleikar hjá okkum komu til sjóndar í dystinum í dag, segði franski landsliðsvenjarin.

Raymond Domenech helt annars fyri, at eftir hansara tykki er franska landsliðið í løtuni ikki eitt av heimsins bestu landsliðum, tí so nógvar útskiftingar hava verið á liðnum í summar, og tað tekur eitt sindur av tíð at spæla nýggju spælararnar saman, segði hann eftir dystin.



*Franski landsliðsvenjarin, Raymond Domenech, viðgekk eftir dystin móti føroyingum, at hann til tíðir hevði verið bangin um úrslitið av dystinum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Til urtagarðin




Ymisk sløg av blómuleykum

Mánadag - fríggjadag kl. 13.00-18.00
Leygardag kl. 11.00-14.00
Annars eftir avtalu

Hanne-Dot
Landavegur 38 · 100 Tórshavn · Tel 215950



# Tipti kritikkin



*Í dag haldi eg sjálvur, at eg enn einaferð prógvaði, hví eg eri á landsliðnum, segði Óli Johannesen eftir dystin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Fáur man longur ivast í, at Óli Johannesen framvegis er sjálvskrivaður á landsliðnum. Liðskiparin var framúr móti Fraklandi, og sjálvur helt hann eisini, at nú mátti tað vera liðugt við viðgerðina av sínum persóni**

LIÐSKIPARIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir dystin mikukvøldið var helst eingin, sum ivaðist í, at tað var rætt hjá landsliðsvenjaranum at halda fast um Óla Johannesen sum verjuskipara á føroyska landsliðnum.

Seinasta hálva árið ella so hevur annars verið tosað og skrivað nógv um, hvørt tað er rætt at halda fast um ein leikara, sum spælir í næstbestu heimligu deildini, og sjálvur helt Óli eisini eftir dystin, at hetta tosið nú mátti verið liðugt.

– Tað hevur verið nógv tos um mín leiklut. Bæði í ár og í fjør. Í dag haldi eg sjálvur, at eg enn einaferð prógvaði, hví eg eri á landsliðnum, og eg vóni, at hetta tosið nú er liðugt.

## Hevur einki við Sveis at gera

Fleiri vilja helst vera við, at dysturin í kvøld - í mun til tann í Sveis - prógvaði, at leikararnir tá kanska ikki bara høvdu tann dystin í høvdinum. Men at teir eisini ótilvitað høvdu fronsku stjørnurnar í tonkunum.

– Tað haldi eg ikki er rætt. Tann tíðin eigur at vera farin frá okkum, og sjálvur kenni eg so einki til hatta. Vit vita allir fullvæl av, at tað ræður um at taka ein dyst og senn, og so bara savnað tankarnar um hann. At avrikið í Sveis so var minni sannførandi, er nakað heilt annað.

Men er ein slíkur dystur kortini ikki nakað, sum kanska kann fáa tykkum at tendra tað lítla pettið meira?

– Sjálvandi. Tað er kanska eina ella tvær ferðir í lívinum, at tú hevur slíkan møguleika. Og eg haldi so sanniliga eisini, at vit tóku av hesum møguleikanum. Hvør tann einasti gav seg fult út í dag, og so kunnu vit ikki krevja meira, segði føroyski liðskiparin at enda.

## Tvær ferðir 100

Hóast eingin av føroysku leikarunum hesaferð fór um runt dystartal, so var talan kortini um jubileum á Tórsvølli mikukvøldið.

2-0 málið hjá Cissé var nevnliga mál nummar 100, sum er farið ígjøgnum hjá føroyska landsliðnum í HM-undankappingardystum. Av 32 dystum hava vit vunnið 4, spælt 1 javnleik og tapt 27. Samlaða málúrtøkan í hesum er 17-100.

Samstundis er tað eisini gloppið ímillum, at seinna málið hjá Malta á Svngaskarði var mál nummar 100, sum er farið ígjøgnum hjá føroyska liðnum, tá spælt hevur verið á heimavølli í altjóða skrásettum dystum. Altso íroknað HM-, EM-, og vinardystir. Her hava Føroyar 43 ferðir spælt á heimavølli. 8 sigrar, 6 javnleikir og 27 tap er tað vorðið til, og málúrtøkan í heimadystunum hevur verið 38-102.

**-jm**



NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK SEPTEMBER 2004**

SKRÁIN VIKA 37-38

**Leygardagur 11. september**
**Kl. 21.00** **Fólkatónleikur í Stóra Pakkhúsi í Vági**
2 trubadurar John Piribauer úr Laplandi og Per Warmind úr Danmark framføra.

Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo

Felags vilji, felags mál



Landsliðið er fyri allar føroyingar.
Tað er Føroya Banki eisini.

FØROYA BANKI

HØVUÐSSTUÐUL HJÁ FØROYSKA LANDSLIÐNUM